gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Ikki gloymdur

**Hóast hann ikki longur er við á vøllinum, so var eingin ivi um, at áskoðararnir hjá FCK framvegis halda nógv um Ståle Solbakken**

DM-GULL

*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk - Keypmannahavn*



*- viðhaldsfólkini hava verið ótrúlig fyri mítt viðkomandi – frá fyrsta bríksli og fram til nú, segði ein fegin Ståle Solbakken mánadagin*

Ein av teimum leikarum, sum kensluliga hevur roynt tað mesta hetta kappingarárið í Danmark, er uttan iva Ståla Solbakken. Norski miðvallarin varð undan árinum keyptur til FCK úr AaB, og fyrstu tíðina var heldur einki at ivast í, at hetta var ein fongur fyri felagið. Ståle var matchvinnari í fleiri dystum, og varð av mongum mettur størsta stjørnan í hópinum, tá ein hjartatilburður brádliga beindi fyri yrkisleið hansara sum leikari.

Skal metast eftir áskoðarunum hjá FCK mánadagin, er tó einki at ivast í, at Ståle framvegis verður roknaður millum teir stóru. »Ståle – Ståle« rungaði um alt Ráðhúsplássið, og tá vit undir veitsluróminum fingu orðið á norðmannin, duldi hann ikki fyri, at hann var fegin um stuðulin, sum hann hevði fingið.

- Hatta var ein sera góð kensla. Viðhaldsfólkini hava verið ótrúlig fyri mítt viðkomandi – frá fyrsta bríksli og fram til nú, og tað eri eg sera fegin um.

### Ikki aftur á vøllin

Ein avleiðing av sjúkralegu hansara hevur sjálvandi verið, at hann seinastu mánaðirnar hevur verið áskoðari, heldur enn leikari, men hendan leikluttin tykist norska stálið eisini at hava átikið sær so við og við.

- Tað gongst sjálvandi betri nú, tá alt er avgjørt. At byrja við var tað sera trupult, men tað venur mann seg við, men sjálvandi hevði eg gjarna vilja verið aktivur eitt sindur longri.

At enda vístu vit Ståle á, at okkurt av donsku morgunbløðunum skrivaðir mánadagin, at talan kanska verður um eitt coma-bacmk til norðmannin innna fótbóltin.

Spurdur, um hetta kanska var nakað, sum nú var serliga aktuelt, var svarið stutt og greitt.

- Tað verður í øllum førum uttan fyri síðulinjuna, segði Ståle Solbakken at enda.

# Todi-fan

**Todi Jónsson telist millum best umtóktu leikararnar hjá donsku meistarunum**

DM-GULL

*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen - Keypmannahavn*

Einki er at ivast í, at Todi er ein av best umtóktu leikarunum hjá donsku meistarunum í FCK. Hetta varð eisini týðiliga undirstrikað, tá leikararnir komu til Ráðhúsplássið mánadagin. At meta eftir ljóðstyrkini hjá áskoðarunum, so eru størstu stjørnurnar so avgjørt Todi Jónsson og liðfelagin Sibosuso Zuma.

At kalla øll viðhaldsfólkini, sum vóru savnaði saman framman fyri Ráðhúsinum, vóru íklætin FCK-búnar, og á fleiri av hesum sást 12-talið á rygginum, við navninum hjá Toda standandi omanfyri.

### Fullkomin spælari

Tá farið varð heimaftur, hittu vit ein av hesum áskoðarunum, Søren Nielsen, og hann hevði so einki ímóti, at vit fingu okkum eitt stutt prát um lið hansara.

Spurdur, um tey eisini í kvøld skuldu hátíðarhalda FCK, segði hann, at mánakvøldið hendi ikki so øgiliga nógv afturat fyri hansara viðkomandi.

- Tað er ikki so øgiliga nógv meira, sum hendir í kvøld. Nú fara vit heim at hugna okkum, men sjálvandi skuldu vit báðir, sonurin, síggja hetta. Hann sat spentur uppi á herðunum hjá mær, meðan spælararnir komu út á balkonina, og eg haldi hetta var stuttligt hjá honum, sigur Søren.

Um orsøkina til, at hann hevur navnið hjá Toda prentað á bakinum, sigur Søren, at tað sjálvsagt kemst av, at Todi er tann spælarin, sum honum dámar best.

- Hann er ein fullkomin spælari, og sá dámar mær eisini væl hansara persónligheit. Hann bæði skorar og spælir fyri liðið, og tað er so avgjørt nakað, sum mær dámar, sigur Søren Nielsen at enda.




# FCK á Ráðhúsplássinum

**FCK vóru gestir hjá býráðnum í Keypmannahavn mánadagin, og eftir hetta fingu viðhaldsfólkini eisini høvi at takka liðnum**

DM-GULL

*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen - Keypmannahavn*

Mánadagin sluppu leikararnir hjá FCK at hugja sær eitt sindur meira, enn teir vanliga gera. Vanliga morgunvenjingin, sum plagar at vera kl. 10.00 var avlýst, og ístaðin høvdu leikararnir lætta venjing kl. 15.00.

Eftir hesa varð so farið inn á Ráðhúsplássið, har borgarstjórin hevði opnað dyrnar, og meðan fjølmiðlarnir skrivaðu vøkru orðini niður, hugleiddi Kramer um liðið, sum nú endiliga aftur er meistari.

Eftir hetta tók Flemming Østergaard orðið, og takkaði fyri stóra heiðurin, sum teimum varð sýndur, og eftir hetta var so klárt til at takka viðhaldsfólkunum hjá FCK, sum vóru á staðnum.

### Rópini

Akkurát hvussu nógv er ilt at siga, men talan var í øllum førum um nøkur túsund fólk, sum vóru komin saman framman fyri Ráðhúsið, og fagnaðurin mundi ongan enda tikið, tá leikararnir so trinu fram á balkonina.

Rópini dundu til leikararnar, og tá hesir so hvørt fóru inn aftur í Ráðhúsið, fóru áskoðararnir undir at rópa nøvnini. Ein fyri og annar eftir vórðu teir so noyddir at koma út aftur, har teir standandi kundu taka ímóti rópunum.

Todi Jónsson var sjálvandi eisini ein partur av hesum, men satt at siga, so tóktist hann ikki at trívast so væl í øllum hesum rokanum,. Kundi heldur bara hugsað sær at sitið í frið heima í stovuni, var líkt til.

Hetta er tó luturin, tá spælt verður við einum stórfelagið. Ikki minst tá spælið hevur gingið væl, soleiðis sum tað hevur gjørt í ár.



# Todi hevur frí

**Eingin orsøk er til at vága nakað undan seinasta dystinum, og tí hevur Todi nú fingið summarfrí**

FRÍTÍÐ

*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Keypmannahavn*

Í dag, mikudagin, endar danska kappingin, og hjá meistarunum úr FCK gongur leiðin til Odense, har heiðursmerkini verða handað eftir dystin móti OB.

Á vøllinum má liðið tó enn eina ferð verða Toda Jónsson fyri uttan. Todi hevuir seinastu tíðina drigist við ein minni skaða í lærinum, og undan stórdystinum móti Brøndby, varð nógv gjørt, til tess at fáa hann til reiðar at spæla. Alt hetta stríðið var tó til fánýtis. Todi varð ikki tøkur til dystin móti Brøndby.

Liðfelagarnir stóðu seg tó væl uttan Toda, og sum kunnugt varð úrslitið, at FCK tryggjaði sær gullið sunnudagin. Hetta hevur eisini víðført, at Todi longu nú fer í summarfrí. Hann heldur ikki, at nøkur orsøk er til at vága nakað við lærinum, og ivaleyst er tað eisini skilagott, at hann soleiðis fær nakrar eyka frídagar.

# Jákup verður í Danmark

Jákup Mikkelsen sigur við danska Ekstra-Blaðið, at um hann fær sáttmála við nakað lið, verður hann verðandi í Danmark komandi trý árini. Tað hevur annars leingi liðið at, at familjan ætlaði at flyta heim, men nú er konan farin undir nýggja útbúgving, og tí verður húskið búsitandi í Danmark komandi trý árini.

Blaðið veit ikki at siga, hvørjum felag Jákup skal spæla við, men sjálvur sigur landsliðsmálverjin, at tað so ikki verður Herfølge.

*jm*

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Kvinnulandsliðið vann elitu-lið

**Tað eydnaðist um vikuskiftið føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti, at vinna á danska elitu-liðnum Rosenlund, í vinardysti millum liðini í Keypmannahavn**

FLOGBÓLTUR

Tað eydnaðist um vikuskiftið føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti, at vinna á danska elituliðnum Rosenlund, í vinardysti millum liðini í Keypmannahavn.

Dysturin var leiktur leygarmorgunin, og vunnu Føroyar 1. og 2. settið, meðan liðið tapti tað triðja. Í fjórða settinum fór spælið aftur at glíða, og Føroyar vunnu dystin 3-1.

Hetta var eitt munandi betri úrslit, enn liðið fekk í dystinum ímóti sama felag fríggjakvøldið, tá Føroya taptu 3-1. Hesin dysturin var leiktur beint eftir at liðið var komið til Keypmannahavnar, og tí sat flúgvitúrurin framvegis í kroppinum, og leikararnir virkaðu troyttir. Serliga vóru tað móttøkurnar, sum ikki virkaðu eftir ætlan í hesum fyrra dystinum.

### Framgongd og skaða

Tað var stór framgongd at hóma frá dystinum fríggjakvøldið til leygarmorgunin. Eftir at spælið hevði verið stirvið og vánaligt fríggjakvøldið, var liðið sum hamskift í næsta dystinum.

Men ikki alt var gott. Álopsleikarin og ársins leikari Helga Nordendal var so óheppin, at koma skeivt niður eftir eitt smassj, at hon fekk skaða í ryggin og mátti gevast at leika. Tað er enn ikki greitt hvussu ávarsligur skaðin er, men Helga Nordendal hevur nógv at siga fyri liðið, og hevur nógvar royndir, so tað er av stórum týdningi, at hon verður klár sum skjótast.

### Gott miðspæl

Í seinna dystinum fór miðspælið eisini at koyra betur, og smanspælið millum Marjun Kalsø og Anniku Joensen og Hjørdis Mortensen virkaði til fullnar. Eisini Helen á Lakjuni fekk seg roynda á miðjuni, eins og Mariann Øster eisini hevaði nøkur sett, og var hon eisini við til at finna stevið í seinna dystinum.

Á kantinum vóru Alvilda Ólavsdóttir, Gudrid Nolsøe, Anna Müller Jacobsen, Gerda Nattestad og Helga Nordendal, sum røktu sína uppgávu. Nakrir feilir vóru gjørdir, men hetta er vónandi nakað sum kann rættast henda seinasta mánaðin, sum liðið hevur eftir í samband við fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar, sum vera á Isle of Man.

### Tvær vóru ikki við

Tina Jacobsen og Margit Joensen vóru ikki við á ferðini orsakað av royndarlesnaði og arbeiðsørindum, men hesar hava eisini stóran týdning fyri liðið. Tina Jacobsen, sum góður blokadeleikari — ársins blokadeleikari 2001 — og Margit Joensen, sum ársins móttøkuleikari og libero 2001.

### Gull-verja

Hesar vera tó tøkar um ein mánaða, tá veruliga niðurteljingin fer at byrja, og liðið skal royna at verja Gullheiðursmerkini frá Gotlandi.

Dystirnir um vikuskiftið vóru teir seinastu undan Oyggjaleikunum, tí Flogbóltssambandið hevur ikki meira pening tøkan til meira fyrireiking hjá A-landsliðnum, tí nógvar aðrar uppgávur liggja fyri framman, sum eisini skulu fíggjast.

### Stuðlar til ferðina

Hesar fyritøkur hava stuðla ferðini: Fa. Karl Øster, Tvøroyri, Sandavágs Bilverkstaður, Norðoya Sparikassi umframt af Føroya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá liðnum.

# Kappsúkkling á norðoyastevnu

**Tórshavnar Súkklufelag skipaði aftur í ár fyri súkklukapping á norðoyastevnu. Kappast varð leygardagin, og aftur í ár hava bæði børn og vaksin kappast.**

SÚKKLING

*Tíðindaskriv*

Leygardagin varð skjøtil settur á árligu Grand Prix súkklukappingina, ið Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri. Kappingin eitur nú ikki Grand Prix súkklukappingin, men +Konto Súkklukappingin, eftirsum Føroya Sparikassi í ár er sponsorur til hesa kapping. Aftur í ár fylgir kappingin summarstevnunum kring landið, og á ólavsøku verður so vinnarin funnin.

Børnini fingu eisini møguleika at royna seg. Børnini vórðu býtt sundur í tríggjar aldursbólkar.

Teinurin, ið súkklaður varð, var frá Norðoya Sparikassa, eftir Skúlavegi, eftir Gerðagøtu og aftur á Biskupsstøðgøtu.

Kappingin leygardagin var ein sokallað Býarkoyringsúkklukapping. Meðan tey vaksnu súkklaðu í 45 minuttir pluss eitt umfar, so súkklaði bólkur I teinin tvær ferðir og bólkur II og III fýra ferðir.

Úrslit, 6 til 8 ár, gentur:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Elinborg Ellingsgaard | Tórshavn |

Úrslit, 6 til 8 ár, dreingir:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Knút Glerup | Tórshavn |
| 2. | Filip Sivertsen | Norðdepli |

Úrslit, 9 til 11 ár, gentur:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Sára Olsen | Klaksvík |
| 2. | Kristina á Høvdanum | Klaksvík |
| 3. | Gerda Heinesen | Klaksvík |

Úrslit, 9 til 11 ár, dreingir:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Rúni Bláffoss | Tórshavn |
| 2. | Rani G. Jacobsen | Tórshavn |
| 3. | Rúni Vágstún | Klaksvík |
| 4. | Gudmund Norðbú | Tórshavn |

Úrslit, 12 til 14 ár, gentur:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Randi G. Jacobsen | Tórshavn |
| 2. | Hansa Nybo | Viðareiði |

Úrslit, 12 til 14 ár, dreingir:

| Nr. | Navn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| 1. | Jákup Lützen | Tórhavn |
| 2. | Finnur Jacobsen | Klaksvík |
| 3. | Bergur Johansen | Argir |
| 4. | Dánjal Michaelsen | Tórshavn |
| 5. | Jimmy Nielsen | Klaksvík |

Úrslit, vaksin:

| Nr. | Navn | Stig | Býur/bygd |
|---|---|---|---|
| 1. | Gunnar Dahl-Olsen | 40 | Tórshavn |
| 2. | Esmar Joensen | 34 | Hvítanes |
| 3. | Sverri M. Edvinsson | 30 | Sand |
| 4. | Eyðun Poulsen | 30 | Tórshavn |
| 5. | Kári Simonsen | 26 | Tórshavn |
| 6. | Eli Christiansen | 23 | Tórshavn |
| 7. | Jens Sigurð Simonsen (Súkklubrek) | 20 | Tórshavn |
| 8. | Eirikur Olsen | 18 | Tórshavn |
| 9. | Christian Guttesen (Súkklubrek) | 16 | Norðdepli |



# Rennikapping í Runavík

**Í samband við bygdastevnuna í Runavík næsta vikuskifti skipar Roysnið fyri rennikapping sunnudagin 17. juni**

RENNING

*tíðindaskriv*




Kappast verður í trimum bólkum: børn undir skúlaaldur, børn í skúlaaldri til og við 12 ár og vaksin. Heiðursmerkir verða latin trimum teimum fyrstu dreingjunum og gentunum í hvørjum bólki.

Børnini byrja áraka VVS-virkinum hjá P/F Zacharias Leitisstein og renna út eftir keiini (Fjøruvegi), venda runt eina keylu og renna so aftur til startin. Smærru børnini renna hesa leið einferð, meðan tey størru renna tvær rundir.

Tey vaksnu renna 10 km. Starturin er sum vant á Heiðavegi við Miklagarð. Runnið verður úteftir til Sjómansheimið, har sneitt verður oman á Fjøruveg. Síðan verður runnið inn eftir Gulasteinsvegi og niðanaftur á Heiðaveg inni við Føroya Banka. Hendan leiðin skal renna 9,5 ferðir. Seinastu ferð verður komið á mál við Sjómansheimið.

Kappingin hjá teimum vaksnu er samstundis fjórða umfar í Grand Prix kappingini í renning. Sunnuvá Bjarnastein úr Bragdinum og Guttorm Sørensen úr Treystinum liggja í løtuni á odda í kappingini.

Kappast verður eftir hesi skrá sunnudagin:

kl. 13.00 Tilmelding við Sjómansheimið

kl. 13.30 Børn undir skúlaaldur renna umleið 400 m

kl. 13.40 Børn í skúlaaldri til og við 12 ár renna umleið 800 m

kl. 13.50 Heiðursmerkjahandan Børn

kl. 14.05 Vaksin renna 10 km